# FaroExpo tilfar í komandi viku

FAROEXPO
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin var við á vinnustevnuni, FaroExpo, sum var hildin í Runavík týsdagin og mikudagin. Vit vóru eisini við til ráðstevnuna og fyrilestrarøðina, sum var í Løkshøll í Runavík seinnapartin mikudagin.

Vit hava longu nú havt nógv tilfar um vinnustevnuna og ráðstevnuna í blaðnum, men enn liggur tilfar eftir, sum vit fara at venda aftur til í bløðunum í komandi viku.

Sosialurin hevur eitt nú prátað við onkra útlendska fyritøku, sum enn ikki hevur verið í blaðnum, og onkur føroysk fyritøka, sum var við og sum vit prátaðu við, liggur eisini eftir.

Aftrat hesum fara vit at práta við tey, sum syrgdu fyri matinum hesar dagarnar, vinnustevnan og ráðstevnan vardu.

Fyrireikararnir siga, at alt gekk væl, og bæði vinnustevna og ráðstevna eydnaðust væl.












# Smyril fekk egnan trossa um bógskrúvuna

Smyril var seinkaður sjey og ein hálvan tíma av Havnini í fyrrakvøldið til Suðuroyar, tí hann fekk um bógskrúvuna, tá hann legði at í Havn.

Tað var ein trossi av egnum skipi, sum kom í karambolasju við bógskrúvuna, meðan skipið legði at.

Smyril skuldi sigla av Havnini klokkan 21, men av tí at hann hevði fingið hendan trossan um bógskrúvuna, tá hann legði at í Havn, varð hann noyddur at útseta fráferðina úr Havn.

Umleið ein tíma eftir ætlaða fráferð fóru froskmenn niður at fáa tað burtur, sum hevði sett seg um bógskrúvuna, og hetta tók somikið av tíð, at Smyril ikki kundi fara av Havnini fyrr enn klokkan hálvgum fimm í gjáramorgunin til Suðuroyar.

- Vit kunnaðu alla tíðina ferðafólkini um støðuna, og góvu teimum tilboð um kømur umborð, greiddi Bogi Mortensen, stjóri á Strandfaraskipum landsins Rás2 frá í gjár.

Smyril sigldi vestanfyri suður í gjáramorgunin, og longu um sjeytíðina var hann í Trongisvágsfirði, og klokkan var ikki farin langt av sjey, tá hann aftur loysti av Krambatanga á veg til Havnar aftur.

**-eij**

# Útlærdir tónleikarar á ferð



Nýliga útlærd og nærum útlærd úr Musikkskúlanum eru um vikuskifti á ferð og verða at hoyra kring landið.

Tað er Norðurlandahúsið, sum hevur gjørt samstarv við Musikkskúlan, soleiðis at tey nýliga og skjótt útlærdu frá Musikkskúlanum, sleppa at framføra og vísa sínar dygdir kring landið.

Hetta er eitt átak, sum byrjar um vikuskiftið og heldur fram líka til marsmánað komandi ár.

Tær ymsu deildirnar í Musikkskúlanum sleppa at royna seg ymsa staðni kring landið, og samstundis fáa føroyingar høvi at hoyra komandi ættarliðið av tónleikarum.

Trý ára skeiði, sum tónleikararnir hava tikið á Musikkskúlanum, gevur teimum møguleikan at søkja inn á Musikkonservatorii í Keypmannahavn, og tí er mikið sannlíkt, at hesir tónleikararnar ikki verða at hoyra ella síggja í Føroyum komandi árini.

Fyrsta deildin, ið fer royna seg, verður klassiska deildin á Musikkskúlanum við tveimum framførslum. Og tær verða um vikuskiftið.

Tann fyrra var í Mentanarhúsinum í Runavík í gjárkvøldið, og tann seinna verður leygardagin kl. 16.00 í Norðurlandahúsinum.

**- eij**